DAGBÓK

Leygardagur 2. august

3. sept.: 15. sunnudagur eftir trinitatis.

4. sept.: Tendring. — Í akurskurð.

6. sept.: Sól risur kl. 5.29 og setur kl. 19.30. - Mánin næstur jørðini.

7. sept.: Mariumessa (føðingardagur Mariu). — Dilkadagur.

Ráðharravitjanir

Í hesi vikuni eru komnir tveir danskir ráðharrar at vitja: løgmálaráðharrin K. Ajjjjjøjøjøjøjøjøjøøø ráðharrin K. Axel Nielsen og kirkjumálaráðharrin Orla Møller.

K. Axel Nielsen skal vera hjástaddur undir vígsluni av tveimum politistøðum: í Tórshavn og Klakksvík (tann í Klakksvík er gamla posthúsið, sum er umbygt til politistøð)Sum ráðharri hevur K. Axel Nielsen eins og Orla Møller ikki vitja Føroyar áður.

Orla Møller gjørdist ráðharri hjá J. O. Krag, tá hann seinast skipaði stjórn og Bodil Koch, sum í mong ár hevur verið kirkjumálaráðharri, gjørdist mentamálaráðharri.

Í fólkatinginum eru tveir prestar í javnaðarbólkinum: Orla Møller, sum hevur havt sæti har nú eitt áramál og Jóhan Nielsen, sum er valdur av føroyska javnaðarflokkinum.

Kvinnan

TAÐ ERU KVINNUR AFTANFYRI ALT

20—24 — RINGASTI ALDURIN HJÁ UNGU KONUNUM

Hagfrøðingarnir eru allastaðni — eisini tá tað ræður um hjúnarbondini. Teir hava nú gjørt upp, hvussu vorðið var við skilnaðarmálum í Keypmannahavn í 1965. Tað vóru í alt 3116 skilsmissur — eitt sindur færri enn árið framanundan. 42 hjúnarbond hildu stytri enn eitt ár, 258 vórðu skild, sum høvdu verið gift í meira enn 25 ár. 715 ungar brúðrar vórðu skildar, áðrenn tær vóru 20 ára gamlar, og 21 vórðu skildar, tó tær vóru farnar upp um 50. — Hvat barnatalinum viðvíkir høvdu 11 skilmissu-hjúnarbond 5 ella fleiri børn, 37 fýra børn, 178 trý børn og 622 tvey børn




Tølini vísa, at 20—24 ár eru tey ringastu hjá kvinnunum. Í hesum aldursstigum vórðu 1212 kvinnur skildar frá monnunum.

WEEK-END

Har skýggini eru vandamikil fyri mannaheilsuna

Vit eru væl spard fyri munandi óreinsku í luftini — tibetur. Var ov mikil óreinska nam hon væl við okkum av ti nógva avfallinum, vit hava. Oðrvísi er í oðrum londum, serstakliga teim um stóru iðnaðarbýunum.



Toka og óreinska í luftini er ein sera vandamikil samanseting. Hon veldir monnum ovurstórar trupulleikar, ið ikki verða loystir fyrr enn oll drivkraft er ravmagn ella atom.

Londontokan er heimskend og kennist ofta væl frá kriminalromanunum; men best kend er hon ivaleyst frá sjúkradagbókunum.

Ein serliga órein Londontoka hongdi seg yvir býin í 1952.

Hon gjørdi, at tað hesar dagarnar doyðu 4000 fólk fleiri enn vanligt.

Luftóreinskan kennir einki mark. Londontokan er máld á svenskum málistoðum og í Danmark kennist svávul-avfall frá Ruhrøkinum í Týsklandi, tá ættin liggur tann vegin.

Tað er serstakliga kroniskt bronchitis, ið tokan hevur á samvitsku sini. Ein væl kend sjúka í teimum stóru iðnaðarbýunul. Í Norðurlondum er hetta lítið kent, men teir visu meina, at tað ræður um at vera á varðhaldi.

BRÆV frá sassin


Sosialurin

Ein hoyrir við hvørt um, at fólk melda seg út úr -fólkakirkjuni. Er hetta neyðugt, um ein heldur seg til annan trúarbólk enn hin kirkjuliga?

J. P.

SVAR: Eingi lógarboð siga, at ein skal melda seg úr fólkakirkjunt, um ein heldur seg til einhvønn annan trúarbólk.

SMÁTING



— Per prakkar altíð tvær ferðir so nógv upp á fólk sum aðrir seljarar. Nú siggi eg, at kona hansara hevur fingið tvillingar.

VÆL SAGT

Hvør diplomatur veit, at ein má velja hin longsta vegin millum tvey punktir fyri at náa málini skjótast gjørligt. (Paul-Henri Spaak)

— — —

Stórir statsmenn skriva verðinssøgu. Bara teir ikki skriva seinasta kapitul.

— — —


Millum menniskjuni finnast nógv fleiri kopiir enn orginalar!

Góð ráð

KEYPISEÐLAR



Ein tómur havragrýns- ella flakes pakki kann verða hentur at hava heftan innanfyri hurðina í køksskápinum til keypiseðlar (kuponir) og annað.



Yvir: 1) land 6) á potti 7) kann 9) ávísingarfornavn 10) eldur 12) streymur 14) vandi 16) tóni 17) ropti 19) forstovan.

Niður: 1) týskur býur 2) tveir eins 3) hám 4) skreiðar 5) íløt 8) tvetr eins 11) stilli 13) reim 15) regugerð 18) 51


5 spurningar

1) Nær kom fyrsti trolarin til Føroyar?
2) Hvat er mótvegis horisental?
3) Hvat merkir retributión?
4) Hvørjum USA-stati liggur býurin Antonio?
5) Hvør á er longst í Italiu?

— — — — — —


SVAR: 1) 1911 2) vertikal 3) endur gjald 4) Texas 5 Po.

KLOKKUGÁTA



1— 2 = tóni
2— 5 = høvuðlutur
6— 7 = felag
8—11 = á báti
9—12 = eiðasørt
1—12 = flutningstóli

FIMMARIN



1 = æla og irra
2 = rusk
3 = anir
4 = hast
5 = luktar
5 = luktar

Veitst tú

AT ravmagnsframleiðslan hjá SEV vóru sløk 39 miljón ir kWh í 1963/64, sløk 45 milj. kWh í 1964/65 og stív 50 milj. kWh í rakstrarárinum 1965/66.


AT tað veruliga finnast fiskar, sum ikki kunnu svimja; teir brúka sínar fjaðrar sum »føtur« tá ið teir skulu ferðast aftur og fram eftir havbotninum.

AT hin kendi suðurafrikanski etnomologurin S. H. Skaife er aftaná gjølligar kanningar kom in til tað úrslit, at meðan stráling við 400 røntgen er nóg mikið at drepa eina menniskju, skulu 5000 røntgen til fyri at drepa eina mýru.

AT flestu hvalir als ongar tenn hava, og tey fáu sløgini, sum hava tenn, brúka tær als ikki á sama hátt, sum flestu onnur djór.

AT kaldasta staðið á kroppinum er kring knæðið; her er hitin fleiri stig lægri enn nakra aðrastaðni á kroppinum.

MYNDARGÁTAN



Finnið navn fyri teimum ymisku smámyndunum, takið fyrsta bókstav burtur úr hesum oðum, setið rætt saman, og tit hava funnið navnið á nøkrum, ið oll halda seg hava ov lítið av.

M HERVALDIÐ

O Fjúrtandi er tagnaður
L um hervaldið í Mjørkadali;
A teir góvu Karsten bara sjokulátu,
R og í ti er einki galið!

Rímsmiðjan

FONGSULVÍGSLUR

Løgmálaráðharrin hevur vitjað nýggja fongslið í Havn, har tað sigst, at geglbúgvar bróta so illa rútar, og politistoðina í Klakksvík — gamla posthúsið — har brummurnar eru gjørdar í gamla sputthjallaranum.

Hann hevur kannað fongslið
sum teir hava bygt í Havn,
og vita um gamla spruttgoymslan
í Klakksvík, landinum ger gavn,
Tað logið honum ljóðar,
at í Havn teir bróta fongslið niður,
meðan tað í Klakksvík
í øllum brummum altíð ræður friður —
har menn seg kenna væl
og hava góðan appetit;
men tað er bara tí, at framvegis
væl luktar av Taffel-akvavit!



— Tað, vit hava av sjáldsomum heima hjá okkum, kunnu vit altíð siggja — og tað er tí, vit ongatíð siggja tað!

* * *

Summargesturin: Regn og toka, vindur og kavaslettingur! Nær hava tit summar her í landinum.

Maðurin: Í fjor var tað ein hósdag.

* * *

Tað er lættari at fyribyrgja enn at lekja, segði tannlæknin. Hann trekti skeiva tonn út!

* * *

Hanna: Eg hoyri, at maður tin er uppsagdur á veðurstøðini.

Sanna: Ja, hann var óbrúkuligur. At enda visti hann ikki at siga, hvussu veðrið hevði verið dagin fyri.

* * *

Longri fritíð hevur tað brek, at tað verður styttri tíð til at spara peðing saman til fritíðina.

Besta gávan til FØROYINGIN burtur og heima er ein FØROYSK BÓK